# Sleppa ikki at lække skattin

**Bygdaráðið við Gjógv hevur rent pannuna ímóti múrinum. Bygdaráðið ætlar at lække kommunuskattin munandi, men landsstýrið sigur nei. Málið er nú á veg í rættin**

SKATTAPROSENT
*Áki Bertholdsen*

Avgerðin, sum bygdaráðið við Gjógv tók mánakvøldið um at lække skattin, er ólóglig.

Tað ívast kommunala eftirlitið ikki í, og tí sleppur Gjáar Kommuna heldur ikki at lække skattin.

Mánakvøldið samtykti bygdaráðið við Gjógv annars at lække kommunuskattin niður í 13% næsta ár. kommunan er væl fyri fíggjarliga og tað heldur bygdaráðið, skal koma fólkinum til góðar.

Annars hevur tað verið lógarfest síðani 1993, at kommunuskatturin skal vera í minsta lagi 16% og í mesta lagi 23%.

Men 1. januar kemur ein nýggj kommunulóg í gildi og tá eru markini fyri lægsta skatt og hægsta skatt tikin av, so at kommunurnar kunnu áseta skattin sjálvar. Og Gjáar Kommuna sigur, at av tí at skattaprosentið, sum nú er ásett, er fyri næsta ár, hevur hon loyvi til at lække skattin niður um 13%.



*Við Gjógv sleppa tey ikki so lætt í skatti næsta ár, sum bygdaráðið hevði ætlað. Í hvussu so er, ikki uttan víðari. Hilmar Høgenni á Kommunala eftirlitinum sigur, at tað er ikki loyvt at lække skattin niður um 16 prosent*

### Ólógligt

Men soleiðis tulkar Kommunala eftirlitið hjá landsstýrinum ikki lógirnar.

Hilmar Høgenni sigur, at tað er púra greitt ímóti lógini frá 1993 at seta kommunuskattin niður um 16%.

Har stendur, at fíggjarætlanin skal verða viðgjørt tvær ferðir í bygdaráðnum og at tað skulu vera minst 14 dagar ímillum hvørja viðgerð. Men í seinasta lagi 1. desember skal fíggjarætlanin verða endaliga samtykt og so skal hon beinanvegin sendast landsstýrinum til góðkenningar.

– Fíggjarætlanin, sum bygdaráðið so hevur samtykt, og sum landsstýrið hevur góðkent, er bindandi fyri, hvussu nógv kommunuskatturin skal vera komandi fíggjarár.

Og somuleiðis sigur lógin, at skatturin skal vera ímillum 16 og 23%.

Hilmar Høgenni sigur, at sostatt eru hesar ásetingarnar eisini galdandi fyri fíggjarætlanirnar, sum verða lagdar nú - tvs fíggjarætlanirnar fyri næsta ár.

– Sostatt er tað ikki fyrrenn næstu ferð, fíggjarætlanirnar skulu gerast, at markið fyri hægsta og lægsta kommunuskatt er tikið av.

– Og sostatt kann bygdaráðið við Gjógv ikki lække skattin niður um 16% fyrrenn fyri árið 2002.

### Seinastu ferð

Hilmar Høgenni sigur, at hetta er samstundis seinastu ferð, at landsstýrið skal góðkenna fíggjarætlanirnar hjá kommununum.

– Hereftir skulu kommunurnar leggja sínar fíggjarætlanir, samtykkja tær og senda landsstýrinum tær. Men landsstýrið skal ikki góðkenna tær.

– Tað verður bara í teimum førum, har ein kommuna skyldar meiri enn eina álíkning, at landsstýrismaðurin í kommunumálum kann geva kommunustýrinum boð um at gera neyðugar broytingar í fíggjarætlanini. Tað kann hann gera um hann heldur, at metingarnar hjá kommununi av inntøkum, útreiðslum og íløgum eru skeivar, ella gjørdar á skeivum grundarlagi, ella um tær eru órímiligar, ella óneyðugar.

# Brotsmenn úr Afrika royna at seta klórnar í góðtrúnar føroyingar

**Føroyingar hava seinastu dagarnar fingið brøv úr Afrika, har tað verður lovað at gera teir til millióningar. Hetta eru brotsmenn og falsarar og tað er umráðandi ikki at lata seg lumpa, sigur løgreglan**

FALSARAR
*Áki Bertholdsen*

At fáa einar 60-70 millióni krónur- fyri einki at gera. Tað man ljóða sum ein dreymur hjá teimum allarflestu.

Hjá nøkrum føroyingum er hesin dreymurin við at gerast veruleiki - um eitt bræv, sum teir hava fingið úr Afrika, er eftirfarandi.

Men dreymurin er longu brostin, tí brævið er ikki eftirfarandi.

Seinastu dagarnar hava fleiri føroyingar fingið bræv úr Afrika, har tað verður lovað at geva teir til fleirfaldaðar millióningar.

Tað einasta, sum teir skulu gera, er at læna einum afrikanara eina bankakonto, sum hann kann seta pening inn á.

Afturfyri ómakin skulu føroyingarnir fáa 30% av upphæddini.

Og talan er ikki um smávegis, tí talan er um heilar 32,3 milliónir amerikanskar dollarar, sum hesin afrikanarin ætlar at seta inn á hesa bankakontina, sum hann skal læna frá føroyingunum og 30% av tí, eru næstan 10 milliónir dollarar, ella 60-70 milliónir krónur.

### Fyrrverandi forsetafrúa

Tað er ikki hvør, sum helst afrikanari, sum kemur við hesi umbønini. Tað er nevniliga ongin annar enn einkjan eftir fyrrverandi forsetan í Tanzania, Julius Nyerere, sum vil sleppa at læna eina bankakonto frá føroyingum.

Hon sigur, at hon hevur fingið navnið og bústaðin hjá føroyingum í pappírum, sum lógu eftir deyða mann hennara.

Tað er sonur hennara, sum eigur peningin, sum talan er um at flyta til Føroya. Peningurin varð ikki settur í banka men goymdur í trygdarskápum. Stjórnin, sum nú ræður í Tanzania er ikki vælviljað ímóti gamlu forsetahúskinum og tí hevur sonurin brúk fyri einum tryggum, útlendskum banka at seta peningin í.

### Prinsar og fúrstar

Á kriminaldeildini hjá løgregluni í Havn, eru hesi brøvini als ikki ókend.

Jens Jensen, politistur, sigur, at tey, sum fáa slík brøv, skulu lata løgregluni tey.

– Vit senda tey so víðari til eina serliga løgregludeild í Danmark, sum arbeiðir við fíggjarligum svikum av ymsum slag. Ti fíggjarligt svik er ikki annað, enn hvat hetta er.

– Tað eru altíð fólk við fínum heitum, prinsar og fúrstar, sum senda hesi brøvini til fólk. Hesuferð er tað so ein fyrrverandi forsetafrúa.

– Men hetta eru onki uttan falsarar. Akkurát, hvat teir fáa burturúr at fáa eitt kontonummar í einum føroyskum banka, kann bara gitast um. Men tað er eyðvitað við tí fyri eyga at misbrúka kontonummarið onkusvegna. Tað kann vera at teir onkusvegna fáa fólk at seta pening á bókina, sum teir síðani royna at fáa hendur á.

Jens Jensen sigur, at tað er ógvuliga umráðandi, at fólk als ikki svara slíkum áheitanum aftur.

– Fólk skulu so slett ikki lata nakað kontonummar frá sær. Men fólk skulu heldur ikki svara noktandi aftur. Tí fáa hesir falsarar fatur á einum brævi, við t.d. einum búmerki hjá eini fyritøku, ella felagsskapi á, kunnu teir eisini misbrúka tað onkusvegna.

– Tað hevur týdning at fólk leggja sær í geyma, at allir upplýsingar, sum tey geva slíkum falsarum, kunnu blíva eitt amboð í teirra hondum, og kunnu misbrúkast onkusvegna.

Jens Jensen sigur, at fáa hesir falsarar fatur á teimum røttu upplýsingunum, ta røttu løtuna, kan tað eydnast teimum at fáa nakað burturúr. Tí er tað umráðandi als ikki at svara aftur, hvørki so ella so.

*Fleiri føroyingar hava seinastu dagarnar fingið lokkandi brøv úr Afrika, har tað verður lovað at gera teir til millióningar. Men talan er um falsarar og fólk skulu undir ongum umstøðum svara teimum aftur, sigur løgreglan*



STRICTLY CONFIDENTIAL
THE PRESIDENT
Please feel free to ask for more clarification
Kind regards,
MRS NYERERE 16/12/2000



Jógvan Arge tekur lesarar

# Pennurin fangar eins nógv og røddin

BØKUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Hvussu ber tað til , at bøkurnar, fyrst hjá pápanum Niels Juul Arge, sála og so nú bøkurnar hjá soninum Jógvan Arge, eru bøkurnar fólk tosa um undan jólum? Ella ikki tosa um, fyri at avgera um tey skulu keypa bøkurnar, tí tey allarflestu, sum leita í bókabúðirnar um jóltíðir keypa hesar bøkur. Men heldur fyri at tosa um innihaldið.

Longu í seinastu viku vórðu 3000 eintøk seld av seinasta útgávuni hjá Jógvan Arge um føroyskan útróður í Grønlandi. Og fleiri verða seldar enn til jóla. Journalistar verða lærdir ikki at seta lesarunum ósvaraðar spurningar. Og uttan at koma við nakrari djúptøknari kanning, so hava Argemenninir tev fyri at leita áhugaverd evni upp. Tá teir so borðreiða tey við løttum málburði og einføldum setningsbygnaði, so er ikki neyðugt at stava teg gjøgnum bøkurnar, tær eru lutfallsliga skjótt lisnar. Og omaná tað heila kenna fólk til evnini og tað er kanska dyggasti stuðulin til góðu sølutølini.

### Konvoyin, ein lort túrur

Ein annar táttur, sum Jógvan dugir meistaliga væl, er at hava nógv fólk og nógvar forkunnugar myndir við í sínum bókum. Hetta førir við sær at rættuliga stór fjøld er beinleiðis ella óbeinleiðis knýtt at bókini. Eitt nú eg sjálvur.

Pápi mín, Leivur Eidesgaard í Oyndarfirði d. 19/2-2000 var 29 ára gamal, tá konvoyin hjá Kjølbro stevndi til Eysturgrønlands í august 1959. Hetta summarið hevði hann ikki nakran kjans, men var so biðin at koma sum maskinmeistari við útróðrarbátinum "Mathildu" í Lorvík.

"Jamen, eg eri ikki útbúgvin maskinmeistari og havi ongantíð fingist við maskinur fyrr, " segði pápi og bar seg næstan undan.

"Tað ger einki, kravið er at ein verður mynstraður sum maskinmeistari og tú kann gott standa sum maskinmeistari á pappírinum," søgdu umboðsmenn Kjølbros, og síðan hendi tað at hesin ungi oyndfirðingurin, sum bestan hugin hevði at fiska, eisini fekk til starv at pumpa upp í forbrúkstangan á "Matildu" og at smyrja har tað var neyðugt. Typiskt føroyskt, øll skulu kunna gera alt. Ein annar oyndfirðingur var eisini við, tað var skyldmaðurin Mourits Petersen, sáli, sum var bestimaður við.

Men túrurin í Eysturgrønlandi við 130 monnum, 10 dekksbátum og einum farmaskipi, Karin K, var ein lort túrur alt í alt. Keðilig ísvíðurskifti, vánaligur fiskiskapur og lønin fyri hesar báðar mánanar var bert 2000 krónur. Og tað var ikki nógv at liva fyri í 1959, nýgiftur so at siga og við trimum smábørnum og fjórða sterkt ávegis.

Jógvan Arge ger nógv burtur úr konvoyini hjá Kjølbro og hann her eisini vesturum og greiðir frá útróðrinum á Stóru Ravnsoygg og aðrastaðir við um hetta mundi.

Bøkurnar hjá Jógvan Arge eru íblásturin til túsund aðrar søgur, sum hann ongan møguleika hevði at fáa hendur á, men sum blóma upp aftur kring landið, nú "Teir tóku land," skjýtur glitrandi gávupappírshamin og fer at liggja upplatin í teim mongu stovunum kring landið.



*Stórsligið sá tað út, tá ið smábátar úr Klaksvík fylgdu teimum 10 útróðrarbátunum teir allar fyrstu fjórðingarnar til Eysturgrønlands*



*Útróðrarkonvoyin í ísinum í Eysturgrønlandi*


Til gaman og álvara

TERA
TLF 448888
Postbox 49
600 Saltangará
Tlf. 448888
Fax. 448889
E-post: info@tera.as

Alliance
Thunderbird
900 Mhz



RAM Spectec 128 Mb PC133
Harðdiskur IBM 30 Gb 7200 umdr.
Skermkort Geforce 2 MX 32 Mb AGP 4x
DVD-støð 10x/40x
Modem56 K
Skermur 17" Hyundai
Hátalarar við Subwoofara
Windows ME

Allar teldurnar frá Tera eru samansettar av dygdar komponentum. Dentur verður lagdur á altíð at nýta nýggjastu tøkni, og komponentarnir eru útvældir fyri at fáa haldgóðskuna so góða sum tilber. Tað ger tað lættari hjá okkum at veita eina góða og skjóta tænastu. Eisini eru tær lættar at byggja út so hvørt tørvurin økist.

Nógv programm fylgja við m.a.
Bonus pakkin
Virði kr. 3.000,-

Kontant einans,-
Við MVG
Kr.,- 16.995,-